# Argjafólk fáa handil

**Í dag letur PE Kolonial, sum annars eisini heldur til í Stoffalág í Havn, upp eina deild á Argjum**

HANDILSLÍV
*Ingrid Bjarnastein*

– Handilin er tann sami, sum handilin í Stoffalág, sigur Petur Eirik Djurhuus, sum er leiðari á teimum báðum handlunum.

– Har verður sama tænasta og sama søla. Handilin er ein Samkeyp handil, og fara tí øll Samkeyp-tilboðini eisini at vera galdandi á Argjum.

Spurdur um grundarlag er fyri at lata ein handil upp á Argjum, sigur Petur Eirik ja. Hann greiðir frá, at nú meðan gjørt hevur verið klárt til handilin skal lata upp, hava fleiri fólk verið inni á gólvinum, og sagt, at tey gleða seg til handilin letur upp. Sum er, so er bara ein Samkeyp handil í Havn, og nú verða sostatt tveir.

– Soleiðis fáa vit eisini nøktað tørvin betri, sigur Petur Eirik Djurhuus. – Fleiri fólk av Argjum koma til Stoffalág at keypa, og tað er eitt sindur langt. Nú kunnu kundarnir í Vesturbýnum fara út á Argjar, tí tað er væl styttri enn at fara allan vegin inn í Eysturbýin.

Lagt verður fyri við einum Samkeypstilboði, og í morgin sodavatnssmakkiroyndir, og kaffi og karamellur. Handilin hevur opið gerandisdagar frá 8 – 19, og leygardagar frá 9 – 14 leygardag.



*PE Kolonial letur nú upp deild á Argjum, har Argjabúðin fyrr var*
*Mynd: Finnur Justinussen*


## Slaktari
til Miklagarð í SMS

Miklagarður í SMS sóknast eftir einum royndum slaktara at byrja 1. juni 2002.

Talan verður um fulltíðarstarv í einum mennandi og spennandi umhvørvi.

Løn eftir nærri avtalu.

Er hetta nakað fyri teg, so ring til slaktaran í Miklagarði, tel. 31 52 62 og spyr eftir Jørgen Jørgensen.

*Miklagarður er størsti matvøruhandil í Føroyum við eini gólvvídd upp á 1700 fermetrar og við meira enn 10000 vørunummrum. Í Miklagarði starvast uml. 80 fólk.*

MIKLAGARÐUR
SMS • Postboks 1069 • 110 Tórshavn • Tel 31 52 62





Eg vil við hesum takka hjartaliga fyri tann dygga stuðul eysturoyingar góðu flokkinum og mær persónliga við valið 30. apríl

Vinarliga
Andrias Petersen






Hevur tú lagt ábyrgdarfæið um til partapening?

Vit hjálpa fegin við at fylla út neyðugu skjølini.

FØROYA SPARIKASSI
www.sparikassin.fo





Hjartalig takka vit 8 valevni javnaðarfloksins í Eysturoy fyri tann dygga stuðul, sum tit vístu flokkinum og okkum persónliga við valið 30. apríl

William Max Hansen
Sunnleiv Højgaard
Sylverius Jacobsen
Artur Johansen
Randi í Jógvansstovu
Katrin Jønsson
Andrias Petersen
Dan R. Petersen




# Ákærdir fyri neyðtøku av føroyskari kvinnu

LØGREGLUTÍÐINDI
*Ingrid Bjarnastein*

Fimm mans eru nú ákærdir fyri neyðtøku og annan kynsligan ágang á føroyska kvinnu í samband við ein jólafrokost í Fredriksberg.

Í hesum málinum vóru annars 11 mans skuldsettir fyri neyðtøku, men ákæruvaldið hevur ikki enn avgjørt, hvat skal henda við teimum seinastu seks monnunum. Henda avgerð verður ikki tikin fyrr enn málið er liðugt. Væntað verður, at eini 16 vitni verða avhoyrd, og fer rættarmálið at varða eini fýra dagar í rættinum í Fredriksberg.

# Ákærdur fyri skilaleysa koyring

LØGREGLUTÍÐINDI
*Ingrid Bjarnastein*

Leygardagin varð ein ungur maður, ákærdur fyri skilaleysa koyring á Kaldbaksvegnum. Hann hevði ov nógva ferð, og gjørdi eina yvirháling. Viðkomandi hevur kanska havt skund, men óheppin var hann, tí bilurin, sum kom koyrandi ímóti var ein politibilur. Hann varð máldur til at hava koyrt 135 km/t, og verður tí ákærdur fyri at hava koyrt skilaleyst og ov skjótt.

Ein annar var tikin við Norðskálatunnilin, eisini leygardagin. Hann var máldur til at hava koyrt 129 km/t, og verður tí lagdur upp til frádøming av koyrikortinum.

# Nógv burturmist og funnið

LØGREGLAN
*Ingrid Bjarnastein*

Á politistøðini í Havn gera teir vart við, at teir liggja inni við eini rúgvu av tingum, sum fólk hava mist burtur. Onkur hevur so funnið hetta og er komin á støðina við tí. Hetta hevur havt við sær, at nú liggur hópin av burturmistum tingum á støðini í Havn, sum løgreglan helst vil sleppa av við. Millum annað kann nevnast, at har liggja 24 fartelefonir, trý fototól, 2 mappur, 128 lyklatyssi, 7 ur, 25 brillur og mangt annað. Um tú ert ein av teimum, ið hevur mist okkurt burtur, kanst tú seta teg í samband við politistøðina í Havn. Møguliga teir liggja inni við lutinum, ið tú saknar.

# Ófriður á Gamla Apoteki

LØGREGLUTÍÐINDI

Leygarkvøldið fekk politistøðin í Havn fráboðan um, at ein maður stóð og sparkaði og bankaði uppá hurðina á Gamla Apotekið, har løgtingsmenn sótu í samráðingum. Hesin maður var ónøgdur um okkurt, og var komin at gera vart við sína ónøgd við at órógva løgtingsmenninar.

Leygarkvøldið vóru tveir mans farnir til hendurs uttanfyri tingshúsið. Teir verða dømdir fyri brot á politiviðtøkuna, sum sigur, at tú skalt ikki elva til ampa ella ófrið. Annar av monnunum var fullur, og varð tí tikin inn á politistøðina at sova rúsin av sær.

Sunnudagin hevði ein fullur maður lagt seg inn í sólsentrið í miðbýnum at sova. Løgreglan kom á staðið, og rendi hann út aftur. Hetta kemur onkuntíð fyri, sigur vakthavandi á politistøðini, tí í sólmiðstøðini er jú bæði heitt og turt

Somuleiðis sunnudagin, varð húsaófriður í Havnini. Har var tað ein maður, ið hevði gjørt ov nógv um seg.

# Sligin og sparkaður

LØGREGLUTÍÐINDI
*Ingrid Bjarnastein*

Fríggjadagin vórðu tveir mans farnir til hendur í Klaksvík. Har var annar sligin og sparkaður, og annars fingið onkrar smásnuddir. Og leygarnáttina var vátt komið í reiðrið ímillum tveir aðrar, har annar so er vorðin skallaður og hevur brotið nøsina.

Annars hevur verið friðarligt í Klaksvík um vikuskiftið. Fleiri paragraff 13 kanningar hava verið gjørdar, og higartil vísir tað seg, at bilarnir eru í góðum standi, verður sagt av politistøðini í Klaksvík.

# Stolin bilur útav við Eggvirkið

LØGREGLUTÍÐINDI
*Ingrid Bjarnastein*

Leygarmorgunin um hálvgum seks tíðina var ein bilur farin útav omanfyri Eggvirkið á Velbastað. Tá politiið kom á staðið var ongin har, men tað vísti seg, at bilurin var stolin úr J. Dahlsgøtu úti í Hornabø í Havn.

Politiið veit ikki, hvør gerningsmaðurin er, men tey, ið áttu bilin fáa bót, tí tey høvdu latið lyklarnar standa í bilinum, og hetta hava tey jú ikki loyvi til.

Ein bilur var eisini stolin av ferjuleguni í Klaksvík. Men nú ongar ferjur sigla, so er gerningsmaðurin ikki sloppin so langt við bilinum, tí hann var funnin aftur á oljukaiini í Ánunum. Politiið í Klaksvík veit ikki at siga, hvør gerningsmaðurin er.

Í Skálabotni var eitt lítið ferðsluóhapp seinnapartin fríggjadagin. Mistanki er um rúsdrekka koyring, verður sagt av politistøðini í Runavík. Ongin persónsskaði var, men tann, ið koyrdi bilin, hevði ikki førararætt.

# Datt úr mastur og doyði

**Umborð á týska seglskipinum, Gorch Fock, sum er á veg til Føroya, hendi ein vanlukka sunnukvøldið, sum hevði við sær, at ein maður lat lív**

ÓHAPP
*Ingrid Bjarnastein*

Íslendska blaðið Vísir, visti mánamorgunin at siga, at ein maður var sunnukvøldið dottin úr mastrini á týska seglskipinum, Gorch Fock.

Klokkan 23.30 sunnukvøldið, fekk íslendska bjargingartænastan boð um, at ein maður var dottin úr mastrini niður á dekkið á Gorch Fock, og at maðurin hevði fingið álvarsligan skaða. Boð vóru send eftir tyrlu. Skipið var tá 83 míl sunnanfirði Hornafjørð. Góðar tveir tímar seinni staðfesti læknin umborð á seglskipinum fyri bjargingartænastuni í Íslandi, at maðurin var deyður. Tyrlan kom eftir deyða manninum og flutti hann til lands.



*Umborð á týska seglskipinum, Gorch Fock, hendi sunnukvøldið eitt óhapp, sum hevði við sær, at ein maður doyði*


Ger vakurleika til veruleika

CLINIQUE
100 % uparfumeret.





Nú er Merete frá Clinique aftur í Parfumarí Drós við góðum ráðum um húðrøkt og make-up

Ring og fá ókeypis tíð til serkøna ráðgeving, frá 13.05-18.05

parfumarí Drós
Bøgøta 15 • Tel. 314811 • Fax 314877